# Neyðhjálpin til Pakistan kemur væl við

**Reyði Krossur Føroya hevur higartil latið 100.000 kr. í neyðhjálp til Pakistan. Menn enn vantar nógv í**

NEYÐHJÁLP
*Snorri Brend*



**Pakistan:** - Í áliti á, at vit fáa pening frá fólki hava vit aftur nú sent 50.000 kr. til neyðhjálpararbeiðið, sum í hesum døgum fer fram í Pakistan, upplýsir Reyði Krossur.

Higartil hevur Reyði Krossur í samanlagt 19 londum sent nærum 90 umboð til jarðskjálvtarakta økið í Pakistan.

Samstundis verður upplýst, at Reyði Krossur/-Reyði Hálvmáni hava biðið um peningahjálp, og hava í løtuni 58 tyrlur í økinum. Fleiri enn 8.000 fólk eru flutt til neyðsjúkrahús og hava sjúkrahúsfólk hjá Reyða Krossi framt fleiri enn 4.000 skurðviðgerðir. Mett verður, at nærri 3,5 mió. menniskju eru vorðin heimleys í Pakistan. Higartil eru um 50.000 fólk deyð eftir jarðskjálvtan.

**Tjøld, tyrlur og fólk**

Tað er tó ikki bert úr føroysku deildini av Reyða Krossi at hjálp kemur til hart rakta økið i Pakistan. Norðurlendsku brøðratjóðir okkara hava eisini veitt nógvan stuðul.

Reyði Krossur í Noregi hevur sent eitt feltsjúkrahús til økið.

Hetta er mannað við norðmonnum og finnum. Umframt hetta hava tey sent akfør, ið kunnu koyra í fjallalendi, tjøld og pening til neyðhjálpararbeiðið.

Hinvegin hevur Reyði Krossur í Danmark sent arbeiðstjøld, samskiftistjøld og manning at stýra hjálpini, sum kemur til landið.

Danska deildin av felagsskapinum hevur áður sent eina hálva mió. kr., eins og danski staturin hevur sent 5 mió. kr., og hevur haraftrat sent 2 mió. aftrat í teirri vón, at fólk vilja stuðla við peningahjálp.

Reyði Krossur í Íslandi stuðlar við peningi og hevur fingið 9 mió. kr. frá Ríkinum, og hava hava fleiri enn 3.000 fólk ringt inn og stuðlað við peningi umveg-is teirra serstøku neyðtelefon.

- Peningin sum føroyska deildin hevur latið, er fingin til vega frá øðrum tiltøkum í tí treysti, at peningur kemur aftur.

- Vit vóna eisini, at Føroya Fólk stuðlar okkum í hjálpararbeiðinum við at senda okkum pening á kontur okkara í peningastovnunum, sigur Reyði Krossur.

## Stuðul

Tey, ið ynskja at stuðla neyðhjálpini til Pakistan kunnu flyta pening á konto hjá Reyða Krossi í Føroyum.

Giro-nummarið er 77011 ella ein kann ringja á tlf. 905656, ið kostar 100 kr. fyri hvørja uppringing.

Til ber eisini at tekna seg sum lim í felagsskapinum. Tað kostar kr. 150 um árið fyri eitt húski og 400 kr. fyri feløg og stovnar.




Nevndin aftanfyri smyrlamóttøkuni á Krambatanga vil veita eina serstaka tøkk til tey ið vóru við til at gera tiltakið 15. oktobur møguligt. Stuðlað hava: Føroya Banki, Føroya Sparikassi, Suðuroyar Sparikassi, Tvøroyrar Kommuna, Vágs Kommuna, Hvalbiar Kommuna, Sumbiar Kommuna, Hovs Kommuna, Porkeris Kommuna, Fámjins Kommuna, Lýsing S/Pf, Suðuroyar Musikkskúli, Ítróttarfeløgini í oynni, Gamlaársnevndin og Strandfaraskip Landsins.